


***Nr. 11*** ***31. mai 2015*** ***75. árg.***

# Harrin opnaði hjarta hennara

*Harrin opnaði hjarta hennara, so at hon gav gætur eftir tí, sum Paulus talaði.*

*Áps. 16,14.*

Vit eru stødd við eina á uttan fyri býin Filippi í Norður-Grikkalandi, har fleiri kvinnur vóru samankomnar, og Paulus og Timotheus tosaðu við tær. Ein av kvinnunum var Lydia, sum handlaði við purpuri. Hon gav gætur eftir tí, sum Paulus og Timotheus talaðu, og Harrin virkaði í hjarta hennara, so trúgvin kveiktist.

Framferðarhátturin er hin sami í dag. Arbeiðstilfarið, sum framvegis verður nýtt, er Guds orð. Ongin kann spinna trúnna út úr sínum egna barmi. Summi royna tað, men úrslitið verður heimagjørd gudstrúgv uttan styrki. Trúgvin kemur av tí, sum verður hoyrt, og tí er tað ikki týdningarleyst, um vit ganga í kirkju ella á møti, ella vit ikki gera tað. "Vit kunnu saktans vera góð kristin, um vit hvørki ganga í kirkju ella á møti," siga summi. Ja, tað er ein stórur spurningur. Um trúgvin kemur av tí, sum verður hoyrt, mugu vit leita inn undir orðið.

Tá ið orðið ljóðar, arbeiðir Harrin, og so kann tað henda, at eitt orð setur seg fast i sinninum. Tann, sum ber orðið fram, hvørvur úr myndini, men orðið verður standandi og letur seg upp, so menniskju taka við tí – eins og Lydia við ánna uttan fyri Filippi. “Tú ert maðurin!” sigur orðið. “Tað er til tín, eg vendi mær nú,” sigur Harrin. Kennir tú ikki hetta? Ert tú ongantíð vorðin gripin av orðinum, soleiðis at tú mátti taka tað til tín?

Ongin kann greiða frá, hvussu tað hendir, at trúgvin verður kallað til lívs. Tað er nevniliga eitt undur. – Í náttúruni hendir

eitt loyndarfult samarbeiði millum fjaldu megina frá sólini, regninum, moldini og tí sprettandi nálini, og úrslitið síggja vit við egnum eygum, tá ið alt sprettur og grør so undurfagurliga um várið. Um Guds andi arbeiðir við orðinum í einum mannahjarta, hendir undrið, og trúarinnar gleði verður skapað. Ongin kann greiða frá tí, men ríkur er tann, sum sannar hetta. – Far í kirkju ella á møti og bið um at sleppa at hoyra, hvat Harrin vil tala júst við teg, sum sagt verður í inngangsbønini í kirkjuni.

*Kvirrur eg siti her orð títt at hoyra,*
*orðið, sum tú nú vilt tala til mín.*
*Harri, eg biði teg: Opna mær oyrað*
*og lat mín hug vera vendan til tín,*
*so at tað orðið, sum tú nú vilt tala,*
*djúpt tað má treingja í hjarta mítt inn*
*varðveitast væl eins og sáðkorn, ið næla,*
*og bera ávøkst í lívi og sinn'!*

# Hitt tronga portrið

*Gangið inn um hitt tronga portrið. Matt. 7,13.*

Jesus sigur, at tað eru tvey portur, sum standa opin fyri okkum – annað leiðir til lívið, hitt leiðir til glatan.

Hitt seinna er lætt at finna. Onki stríð: tú kanst hugsa og liva, sum tú vilt. Tær nýtist hvørki prædikarar ella lærarar at siga tær, hvussu hetta portrið er. Tú skalt bara fylgja hinum mongu, tí mong ganga inn um tað.

Men Harrin kom at opna okkum hitt tronga portrið og at tryggja teimum, sum honum fylgja, fullkomna frelsu. "Eg eri dyrnar. Gongur nakar inn um meg, skal hann verða bjargaður," sigur Jesus.

Hesar dyrnar eru ikki trongar, tí at Kristus er trongur. Nei, náði hansara er markleys; men hesar dyrnar loyva ikki víðum hugsanum ella ein slakan lívshátt. Tú kanst ikki gera, sum tú vilt. Yndisgudar eru forbodnir á hesum vegi. Eins og ennisbrattur stoltleiki, njóting og drykkjuskapur og havisjúka ikki verða told. Vilt tú koma inn, skalt tú avnokta teg sjálvan.

Ongin spælir seg inn. "Strembið!" sigur Harrin. Mangt er, sum forðar. Hin Óndi er til arbeiðis nú sum fyrr. Heimurin

hevur langar tøkuarmar. Dirvisloysi kúgar mong. At líta á framtíðina við egnum mátti fær mong at standa uttanfyri. Hitt syndraða sinnið kemur onga leið – nei, Harrin má eiga eitt heilskapað hjarta! Og vit skulu í tí smáa gera skyldu okkara.

Bið! Bið! Boyggj teg! Tak um Harran! Halt honum føstum í lýdni og trúgv!

*Opið Guds elskandi hjarta man standa,*
*enn finna syndarar opnan hans favn;*
*hví vilt tú longur tá drála í vanda,tá tú*
*kanst ankra í tryggastu havn?*

*Effie Campbell.*

# At geva seg yvir

Kor-I-Nord Diamanturin er ein av heimsins vakrastu gimsteinum. Hann hoyrir upp í teir bretsku "krónjuvelarnar". Tað var Indialands Maharaja, sum gav Victoriu drotning henda gimsteinin, tá ið hann var smádrongur. Tá ið hann var vaksin, vitjaði hann drotningina og spurdi, um hann kundi sleppa at síggja gimsteinin aftur.

Við gimsteininum í hondum sínum fall hann á knæ framman fyri drotningini og segði: "Tygara hátign, henda gimsteinin gav eg tygum, tá ið eg bert var eitt barn og ov ungur til veruliga at skilja, hvat ið eg gjørdi. Nú - í mínari fullu manndómsmegi - gevi eg hann til tygara av øllum hjarta mínum, við kærleika og takksemi - nú og um allar ævir, heilt tilvitandi um, hvat ið eg geri."

Far tú niður á knøini í dag og sig: "Harri Jesus, eg gevi meg heilt og fult upp í hendur tínar!"

"... Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

---

Tá ið Jesus kemur aftur her niður á jørðina, kemur hann í sínum jødiska identiteti. Tá ið hann setir føturnar á Oljufjallið, kemur hann sum “leyvan av Juda” og “rótskot Dávids”. Tí er tað, at tað er so nógv rumbul í Miðeystri. Bardagin er andaligur.

*e.c.* ums.

# Kærleikin tolir alt

Ein mamma sat í bíðirúminum hjá læknanum við seks ára gamla syni sínum. Meðan tey soleiðis sita, fer sonurin at spyrja mammuna um alt millum himmal og jørð. Eftir einum hálvum tíma náddi hann at spyrja um flestu gáturnar, sum møta eini menniskju. Øll, sum sótu í bíðirúminum, undraðust á, hvussu tolin mamman var, tí hon svaraði øllum spurningunum grundiga og tolin.

Sjálvandi spurdi hann eisini um Gud. Meðan hini í bíðirúminum lurtaðu eftir hansara endaleysu "hví?" og "hvussu?" kundi tú næstan lesa út av andlitum teirra: Hvussu orkar hon at blíva við? Men tá ið hon svaraði næsta spurninginum hjá soninum, svaraði hon eisini teirra. "Hví?" spurdi hann, " verður Gud ongantíð móður og bara gevst?" Eftir at hava hugsað seg um eina løtu, svaraði hon: "Tí Gud er kærleiki, og kærleikin gerst aldri móður."

Tað sama sigur Bíblian: "Náðigur er Harrin og miskunnsamur, tolin og ríkur av góðsku." (Sálmur 145,8).

*Eg vil fylgjast við tær, eg vil fylgja tær svá,*
*sum títt orð vísir klárliga mær;*
*ger meg reinan hvønn dagin her foldini á*
*fyri krossin hin tunga, tú bar!*
*Eg fylgja tær vil, Harri Jesus!*

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 31. mai. | Tekstur: | Áps. 2,40-47; | bíbliuorð: | Gal. 2,20 |
| 7. juni. | Tekstur: | Áps. 3,1-11 + 4,7-10 + 1.Kor.12,4-6; | bíbliuorð: | Sálmi 13,6 |
| 14. juni. | Tekstur: | Áps. 4,1-20; | bíbliuorð: | Áps. 4,20 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 12* *14. juni 2015* *75. árg.*

# Rannsakan

*"Rannsakið tykkum sjálvar, um tit eru í trúnni!"*
*2. Kor.13,5.*

Hvussu fer ein slík rannsakan fram? Og hvat vita vit, tá ið saman um kemur? Verður úrslitið av eini slíkari kanning ikki altíð negativt?

Latið okkum fyrst og fremst gera okkum greitt, at har stendur ***ikki***: Kannið, um tit kunna finna trúnna hjá tykkum sjálvum! Har stendur: Rannsakið tykkum sjálvar, um tit eru í trúnni. – Tað merkir: Gerið upp við tykkum sjálvi! Eru tit fluttir út úr tykkara egnu húsum og inn í bygningin, sum stendur á einum óvikiligum grundarlagi? Her er ikki talan um eina einsinnishending, men um eina hending, sum verður endurtikin hvønn einasta dag. Vit eru ringd saman um okkum sjálvi. Vit vilja máta virðið í trúnni eftir tí, sum vit merkja, og eftir, hvussu ofta vit vinna sigur; men tað er vónleyst. Flyt út úr tínum egna! Bygg á tað, sum Gud hevur sagt og gjørt! Gev ikki fíggindanum viðhald, tá ið hann freistar til sjálvrannsakan á skeivum grundarlagi!

Tínæst er vert at geva sær far um, at Paulus sigur: "Vit eru máttleysir í honum." Máttloysið økist, um vit leita inn til Kristus, og tað broytir natúr. **Trúgvin er ikki tað at blaka frá sær, men at geva seg yvir til hansara**, sum bæði kann og vil leiða okkum inn á rætta leið og fram eftir vegi friðarins. Vit eru fyri ongum, um vit verða yvirlátin til okkum sjálvi; men tann, sum lítur seg til tann krossfesta og upprisna, er á rættari leið.

Um máttloysið ber tað við sær, at vit verða bundin at Kristi, virkar Guds kraft í lívi okkara. Tað liggur ikki í okkara hondum at hava eftirlitið her, men vit eiga at vænta nógv av Gudi. **"Tí**

**at tá ið eg eri veikur, tá eri eg sterkur,"** sigur Paulus. Hvat sipar hann til? Hann meinar, at tann, sum treytaleyst lítur seg í Guds hendur, fær at sanna, at Gud ber og er trúfastur, og at Hann altíð veit ráð.

"Rannsakið tykkum sjálvar, um tit eru í trúnni; roynið tykkum sjálvar!" Lat sak tína hvíla hjá honum, sum sjálvur vil fullføra tann góða gerningin, sum hann byrjaði í tær í dópinum!

*Eg kenni tryggar grundir,*
*og veit, hvat heldur á,*
*tá verðin øll fer undir*
*og brennur eins og strá;*
*um moldin meg enn fjalir,*
*er sál mín frí og sæl;*
*til sínar høgu sælir*
*meg Harrin heinta skal.*

# Navn hansara á ennum teirra

*Og tænarar hansara skulu tæna honum. Og teir skulu síggja ásjón hansara, og navn hansara skal vera á ennum teirra.*

*Opb. 22,4.*

Vit biðja dagliga: "Verði vilji tín sum í himli so á jørð." Í hini ævigu sæluni er alsamt virksemi; men meðan arbeitt verður, verður eisini hvílt. Sum børnini spæla og fuglurin starvast, soleiðis verður arbeiði okkara. Ongin møði, ongum leiðist við at arbeiða. Og øll evni okkara eru tá nýtt í arbeiði hansara.

Vit skulu síggja ásjón hansara. Her bara hóma vit hana og gruna bara vakurleika hansara. Her kenna vit hann ikki, og tó kenna vit á okkum, at hjarta brennur í okkum, meðan hann er við okkum á lívsleiðini. Men har skulu vit skoða kongin í allari dýrd síni, vit skulu síggja hann, sum hann er, og altíð vera hjá honum.

Navn hansara, tað er atburður hansara, skal lýsa av ásjón okkara. Vit skulu vera sum hann, og sum sólgeislarnir glitra í einum vatndropa, skulu dýrdarríku eginleikar hansara liggja bjartir sum ljósið í okkum.

Soleiðis er sælan lýst á hinum seinastu síðunum í Bíbliuni. Hetta er endamálið, sum vit stremba eftir. Men skulu vit fullføra endamálið, mega vit ganga vegin. Tí má lív okkara

verða myndað sum ein endaleys gudstænasta. Hóttafall má ikki koma á samfelag okkara við hann í trúnni, og vit mega dagliga vera undir meistarans skapandi hond.

*Og fær í hjartadýpi*
*sítt bílæt' greitt hann sæð,*
*tá náðigerð hans er lokin,*
*og meistarans lund verður glað.*

*t.* týddi.

# Kom inn í nærveru Guds

Bobby Conner

"Tí at eygu Harrans reika um allan heimin til tess at magna (styrkja) tey, sum av heilum huga eru við honum (sum hava reint hjarta)." 2. Krýn. 16,9. Tað er bara við reinum hondum og reinum hjarta vit kunnu fara niðan á Harrans fjall. Og tað er bara her, á fjalli Harrans, at vit kunnu taka ímóti tí uppgávu og tí førleika og útbúnaði, sum Anda Guds leingist eftir at loysa niður yvir Kristi likam. Sí Sálmur 24,3-4.

Tíðin er komin at taka ímóti kallinum og fara til gongu niðaneftir. Tað er ein innbjóðing at strekkja seg longri, so at vit kunnu síggja víðari og hoyra greiðari. (Opinberingin 4,1-5) Bara, tá ið vit koma longri niðan, gerast vit før fyri at síggja Guds ætlan við lívi okkara.

Tann sum skrivað hevur Hebrearabrævið, minnir okkum á, at Gud er heilagur, og at vit skulu vera heilag sum hann. "Tí at Gud okkara er oyðandi eldur." Hebr. 12,29. Alt, sum verður etið upp av Guds eldi, er slíkt, sum okkum ikki tørvar.

Í 5. Mós. 4,24 fáa vit eina harðliga ávaring um Guds oyðandi eld: "Tí at Harrin, Gud tín, er oyðandi eldur, vandlátur (sjalu, øvundsjúkur) Gud." Guds øvundsjúka reisir seg fyri fólki hansara. Hann kallar okkum inn til sín sjálvan. Vit mugu gera okkum greitt, at Jesus Kristus vil ikki luta sína brúður við "hesar heimsins vegir". Paulus skrivar: "Tí eri eg vandin (sjalu) um tykkum við vandlæti (øvundsjúku) Guds; tí at eg havi trúlovað tykkum við einum manni, fyri at eg kundi leiða eina reina moyggj fram fyri Krist." 2. Kor.11,2.

Boðskapurin er hesin: "Gevst við at ganga á heimsins óndu vegum og fevn um Kristi reinleika." Hesin reinleiki verður loystur yvir øll tey, sum søkja Hann við øllum hjarta sínum. Sí Jeremia 29,12-13.

*"SHALOM"*
*Effie Campbell umsetti.*

# Tryggur í størstu neyð

*Børn míni, tit eru av Gudi og hava vunnið á teimum; tí at tann, sum er í tykkum, er størri enn tann, sum er í heiminum.*
*1. Jóh. 4,4.*

Ein leiðari í einum kristiligum arbeiði upplivdi truplar dagar. Mong baktalaðu hann, og hann var um at missa mótið. Tíbetur var har ein eldri kvinna, sum hevði umsorgan fyri honum. Hon hevði lært bæði eitt og annað gjøgnum lívið, og tí leitaði hon hann upp fyri at stuðla honum. Hon tók fram eina lítla innrammaða mynd, sum hon hevði við sær av Dánjali í ljónsbølinum. "Hygg at hesi myndini," segði hon, "og sig mær, hvat tú sært." Maðurin sá fleiri leyvur við afturlatnum munni, og Dánjal, sum stóð við hondum aftan bak. "Sært tú nakað meiri?" spurdi hon. Nei, maðurin sá onki annað. "Gev tær far um, at Dánjal hyggur ikki at leyvunum, hann hevur fest eygu síni á Harran."

*Trúgv, tá teg heimurin hatar,*
*hóttir við bál og deyð.*
*Ein – sum ein "gudssonur" - ger teg*
*tryggan í størstu neyð.*

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum eina gleðiliga hvítusunnu.***

***Blaðstjórin.***



---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14. juni. | Tekstur: Áps.4,1-20; | bíbliuorð: | Áps. 4,20 |
| 22. juni. | Tekstur: Áps.8,26-40; | bíbliuorð: | 1.Tim. 2,4 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74